# Vaska Føroya reinar

**Skal nakað vaskast, hevur Kemilux tað, sum skal til og tey taka fegin ímóti góðum ráðum og hugskotum frá viðskiftafólki**

- Eitt er, at vit fáa høvi til at vísa okkara vørur fram. Men fyri okkum hevur tað minst líka stóran týdning at vísa okkum sjálvi fram og at hitta okkara viðskiftafólk.

Tað sigur Arni Gunnarsson, sølustjóri í Kemilux.

Kemilux hevur nú yvir 40 ár á baki og hevur hesi árini ment seg til at hava eina etableraða støðu á heimliga og útlendska marknaðinum.

Men tað er sjálvandi tí at teir hava eina vøru, sum hevur staðið sína roynd.

Og skal nakað vaskast, hevur Kemilux tað, sum skal til.

- Vit hava eitt stórt úrval av sápum til alskyns endamál, bæði til húsarhaldið og til ídnaðin, tvs bæði til virki og til skip.

- Men harafturat hava tey eisini bustir, pappírsvørur og annað, sum skal brúkast í reingerðini.



*- Tað hevur stóran týdning at vit fáa eitt slíkt høvi sum hetta at hitta okkara viðskiftafólk og vit eru serliga spent at vita, hvørjar royndir tey hava av okkara framleiðslu, sigur Arni Gunnarsson, sølustjóri á Kemilux*

- Tað vísir seg at vera ein stórur fyrimunir, at vit hava eina heildarloysn at bjóða okkara viðskiftafólkum, so tá ið tey skulu vaska, skulu tey kunna fáa alt á sama staði fyri at tey sleppa undan at renna í fleiri handlar, áðrenn tey sleppa ígongd.

## Góð hugskot vælkomin

Tað, sum Kemilux hevur, er føroysk framleiðsla burturav. Sjálvt dunkarnir eru gjørdir í Føroyum. Hinvegin eru bustir og onnur útgerð, ikki gjørd í Føroyum

Men endamálið við luttøkuni á stevnuni er líka nógv at vísa flaggið, tí hetta er eitt kærkomið høvi til at hitta viðskiftafólk og kanska fáa samband við nýggj viðskiftafólk.

- Okkum dámar sera væl at koma á tal við okkara viðskiftafólk, sigur Arni Gunnarsson.

Hann sigur, at tá ið tey tosa við viðskiftafólk, eru tey altíð spent at vita, hvørjar royndir tey hava av ymsum vørum frá Kemilux.

- Tað kemur meiri enn so fyri, at vit fáa góð hugskot frá okkara viðskiftafólkum um ymisk viðurskifti, vit ikki hava hugsað um.

Arni Gunnarsson sigur, at talan kann vera um, at onkur hevur funnið upp á at brúka eina vøru frá Kemilux til heilt onnur endamál, enn tey, sum hon upprunaliga varð gjørd til.

Eitt dømi um tað er HG-Ekstra sápan, sum Kemilux upprunaliga gjørdi at vaska virki við.

- Men so fingu vit at vita frá viðskiftafólki, at hendan sápan eisini var ein frálíkur rustloysari, tí tað høvdu teir sjálvir roynt umborð á skipi við sera góðum úrsliti.

- Nú verður so hendan vøran eisini marknaðarførd til lættari rustviðgerð, sigur Arni Gunnarsson.

Men er talan um rust, sum situr djúpari, hava vit eisini ein sterkari loysara til ta endamálið, leggur hann afturat.

Eitt annað dømi úr vanliga húsarhaldinum er, at nógv hava uppdagað, at vælkenda Sitrón Uppvaskið kann brúkast til nógv annað enn at vaska upp við.

Tað eru nógv, sum vita, at Sitrón Uppvask er frálíkt til at vaska bil við og til at taka blettir úr klæðum, tá ið tey verða vaskað.

Men er talan um gravskitin klæðir við blettum av olju, víni ella feitti, er onki betri enn at seta tey á blot í ein hálvan tíma S-1 Ekstra, sum er gjørt at vaska skipasíður, gólv og annað gravskitið við.

- Hesi bæði dømini eru verri enn so tey einastu, sigur Arni Gunnarsson.

Høvuðsmarknaðurin hjá Kemilux er framvegis tann føroyski, men nú verður triðingurin av framleiðsluni útflutt til viðskiftafólk í Noregi, Danmark, Skotlandi, Íslandi, Grønlandi, Kanada og aðrastaðni við.

Í løtuni arbeiða 14 fólk hjá Kemilux.



Sosialurin